## Pisudagur á Platform




**Sunnudagin 8. august kl. 17:00 skipa Meginfelag Føroyskra Studenta og Altjóða Skrivstovan fyri kunnandi fundi á Platform, ætlaður teimum, ið fara undir hægri lesnað uttanlands**

PISUDAGUR
*Tíðindaskriv*

Nógvir eru spurningarnir, ið stinga seg upp, tá ið flytast skal av landinum í lestrarørindum, og fundurin fer at snúgva seg um praktisku, fíggjarligu og sosialu viðurskiftini, ið eru hent at hava greiðu á, áðrenn farið verður undir eitt nýtt lestrarlív. Av hesum kunnu nevnast íbúðar- og skattaviðurskifti, stuðulsskipanir og lestrarbyrjan sum heild.

Umframt umboð fyri MFS og ASK, vera føroysk lesandi frá ymsum donskum býum, Norðurlondum, Stóra Bretlandi og USA við á fundinum, og høvi verður at seta teimum spurningar um lestrarlívið í ávísa landinum.

Eftir kunnandi partin verða luttakararnir býttir upp í smærri bólkar, eftir lestrarstaði, har høvi verður at seta spurningar og at hitta onnur, ið ætla sær til sama land ella bý.

Pisudagurin er eitt afturvendandi tiltak, ið plagar at vera væl vitjað, siga MFS og ASK í tíðindaskrivi.

### Koyrdi á hann

Ein ferðsluvanlukka við minni persónsskaða hendi á Sandoynni um vikuskiftið. Ein maður datt av einum prutli og kom fyri ein bil. Førarin av prutlinum fekk okkurt smærri beinbrotið. Óhappið hendi á Høvdaheygavegnum.

**-hkm**

### Grind sunnanfyri

Ein grind upp á 30 hval legði beinini á Tvøroyri leygardagin klokkan 13:15. Grindin var upp á 370 skinn, og býtt varð til Tvøroyrar kommunu.

**-hkm**

# Hátrýstið fær lágtrýst frá Ferðslutrygd

**Ferðslutrygd hartar sjónvarpið fyri ikki at súkkla við hjálmi**

FERÐSLUTRYGD
*Tíðindaskriv*



Í sendingini »Hátrýst«, sum verður send saman við »Dag og Viku«, varð mánakvøldið 3. august greitt frá um ferðamøguleikarnar á súkklu í Sandoy. Í sendingini sást verturin í sendingini súkkla uttan hjálm.

– Tað, at greitt verður frá um møguleikarnar at súkkla í Føroyum, er sera gott. Í veruleikanum er land okkara nógv betri at súkkla í, enn tey flestu geva sær far um. Og høvdu tey, sum gera vegir, hugsað um súkklararnar eisini, so hevði verið enn betur. Og at súkkla er sunt fyri bæði likam og sál, sigur Ferðslutrygd í tíðindaskrivi á heimasíðuni.

– Tað at sjónvarpið í einari annars áhugaverdari sending í bestu senditíð ikki kann verða meira umhugsið enn so, at syrgt verður fyri at hjálmur verður nýttur í hesum sambandi, er ikki nóg gott. Ferðslutrygd kann tí ikka geva sendingini Hátrýst annað enn lágtrýst fyri hetta lýtið, sigur Ferðslutrygd.

Eir í Ólavstovu, verður í sendingini »Hátrýst« í SvF, fær dumpikarakterin Lágtrýst frá Ferðslurygd, tí hon var so óumhugsin ikki at nýta súkkluhjálm

(Myndin er klipt av SVF á netinum)

# Samanlegging á alnótini

**Hóast Kirkjubøar og Tórshavnar kommuna ikki alment leggja saman fyrr enn 1. januar 2005, so leggja heimasíðurnar hjá kommunum saman í dag**




KUNNINGARTØKNI
*Tíðindaskriv*

Tórshavnar kommuna og Kirkjubøar kommuna hava longu framt ein part av kommunusamanleggingini – tær hava lagt saman heimasíðurnar www.torshavn.fo og www.kirkjubo.fo

Alt tað, sum fyrr lá á www.kirkjubo.fo er nú vorðið ein partur av torshavn.fo. Soleiðis ber nú til at lesa: frásagnir av gomlum bygdarráðsfundum undir býráðsarbeiði, hagtøl fyri fólkavøksturin undir Tórshavn í tølum og um skúlabarnakoyringina í Kirkjubøar kommunu undir bussleiðini. Kunngerðir og fundarskráir hjá bygdaráðnum framyvir verða eisini lagdar á torshavn.fo

# Rætting



*Í blaðnum í gjár høvdu vit eina grein um sangin og føroyska dansin á Vaglinum á ólavsøku. Tíverri vóru nøvnini á myndini komin skeivt fyri. Hesi eru røttu nøvnini. F.v.: Katrin Holm, Tóri í Hoyvík, Herluf Joensen, Petur Olivar í Hoyvík og Regin og Vilbjørg Eikhólm*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður:

# Sjónvarpsstjórin fer út um sína heimild

**Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, heldur ikki, at sjónvarpsstjórin hevur heimild at senda Danmarks Radio óviðgjørt i heyst**

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Jógvan á Lakjuni heldur ikki, at sjónvarpsstjórin hevur heimild at senda Danmarks Radio óviðgjørt og beinleiðis ætlanin er*

*Mynd: Maria Olsen*

Síðsta orðið í málinum um Danmarks Radio og Sjónvarp Føroya er ikki sagt enn.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við ábyrgd av SvF, heldur ikki, at sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal hevur heimild at seta Danmarks Radio óviðgjørt á skíggjan.

– Mín tulking er, at sjónvarpsstjórin ikki hevur heimild at senda Danmarks Radio, sum hann ætlar, sigur Jógvan á Lakjuni.

Lamdsstýrismaðurin ætlar sær at fara á fund við sjónvarpsstjóran í næstum um støðuna viðvíkjandi ætlaðu samsendingini hjá SvF við DR. Jógvan á Lakjuni fjalir ikki útyvir, at hann er harðliga ímóti, at latið verður upp fyri Danmarks Radio í Sjónvarpi Føroya á henda hátt.

Landsstýrismaðurin sigur seg vera greiðan yvir, at eitt tílíkt mál er viðbreki. Ikki minst tá einki er ímillum sjónvarpstjóran og landsstýrismannin. Men sjónvarpsstjórin og landsstýrismaðurin hava hvør sína tulking, hvat sjónvarpsstjórin kann heimilda sær at senda.

Landsstýrismaðurin heldur ikki, at sjónvarpsstjórin kann kalla tað sína programábyrgd, tá sent verður beinleiðis á henda hátt frá Danmarks Radio.

– Hetta er eitt øgiliga prinsipielt mál. Sjónvarpið skal senda føroyskt tilfar og vera ein týðandi táttur í at styrkja mentanina. Tí er tað eitt løgið stig bara at senda Danmarks Radio á henda hátt, sigur Jógvan á Lakjuni.

Landsstýrismaðurin fer at halda fram við at kanna, hvørjar heimildir sjónvarpsstjórin hevur.

Hevur hetta nógva stríðið um sjónvarpið ikki skatt stovnin og virðingina fyri mentanarøkinum?

– Tað havi eg onga viðmerking til. Stríðið er nakað fjølmiðlarnir finna uppá, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Sambært kringvarpslógini

Mikkjal Helmsdal hevur allatíðina, síðani málið gjørdist alment kent, sagt, at hann hevur heimild at taka eina tílíka avgerð sum at senda Danmarks Radio. Hetta endurtekur hann í Dimmalætting í gjár. Við blaðið sigur sjónvarpsstjórin eisini, at hann er ikki bangin fyri at missa starv sítt. Hann metir seg hava programábyrgdini sambært orðingunum kringvarpslógini, og tað er við støði í hesum – og fyri at sleppa undan uppsagnum – at hann hevur tikið nógv umrøddu avgerðina um at senda Danmarks Radio óviðgjørt og beinleiðis í heyst.

Tað er í løtuni óvist, nær samsendingin við Danmarks Radio byrjar, men ætlanin um at senda Danmarks Radio stendur við. Ætlanin er, at føroysku sendingar skulu sendast í einum blokki hvørt kvøld. Aðrar tíðir verður samsent við Danmarks Radio. Men tað er ikki heilt greitt enn, um hesin leisturin verður valdur ella redigerað verður so ella so í tilfarinum frá DR.

### Meira fyri minni

Í feskastu ársfrágreiðingini hjá Sjónvarpi Føroya verður sagt, at nøgdin av føroyskum tilfari fer at minka komandi ári. Orsøkin er vantandi fíggjarlig orka til at framleiða meiri føroyskt tilfar. Frá farna landsstýrið fekk Sjónvarp Føroya játtað eina økta inntøku við fýra hundrað krónum netto fyri hvønn hyggjarar. Men nú verður framleitt enn minni

– Eg haldi tað vera heilt ótrúligt, at sjónvarpið klárar at framleiða minni fyri meira. So nógv eru lønarútreiðslurnar ikki voksnar, sigur Jógan á Lakjuni

Men landsstýrismaðurin vil ikki gera nakrar viðmerkingar til, um hetta fær nakrar fylgjur fyri sjónvarpsstjóran.

# Breiða semjan helt tørn

**Teir 21 tingmenninir megnaðu at halda somu takt, tá ið viðgerðin av løgmansrøðuni byrjaði**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Tað er ikki tað sama at sita í andstøðu. Sum andstøða bar væl til at kritisera, men kritikkurin heglaði eisini á Tjóðveldisflokkin í tinginum týsmorgunin*

*Mynd: Maria Olsen*

Í Gundadali vann andstøðan 6-4 móti samgonguni í fótbólti. Tá vóru ellivu móti ellivu á vøllinum. Á politiska stríðsvøllinum á Føroya løgtingi hevur samgongan 21 tingmenn, og andstøðan hevur bert ellivu í sínum parti. Alt annað líka eigur hetta at geva samgonguni ein fyrimun. Og so var eisini týsmorgunin, tá viðgerðin av løgmansrøðuni byrjaði. Teir 21 tingmenninir funnu til tíðir okkurt at vera ósamdir um, men tað var sjáldan meira enn longdini á flogvallabreytini í Vágum.

Samfelagsfrøðingurin Jóannes Hansen helt í Útvarpi Føroya fyri, at hveitibreyðsdagarnir ella hunangsmánaðurin hjá samgonguni var ikki meira enn akkurát liðugur.

Og tað hevur kanska heldur ikki verið so nógv tíð at finna ósemjur. Tá 21 tingmenn eru so samdir, var tað eisini so sum so at vera eygleiðari hendan týsmorgunin.

Politisku framsøgufólkini hjá samgonguni róstu hvørjum øðrum dúgliga, og flokkarnir tóktust eisini at nærkast hvørjum øðrum í sjálvstýrisspurninginum.

### Harður kritikkur

Fremsti kritikkarin og tann mest ósamdi við orðingarnar í løgmansrøðuni var ikki heilt óvæntað Høgni Hoydal. Hann helt ógvuliga lítið um ætlanirnar hjá samgonguni. Flestu orðini í løgmansrøðuni passaðu ikki væl til hugsjónirnar hjá Høgna Hoydal. Hann segði millum annað, at løgmansrøðan var lítið ítøkilig, var á skeivari kós í fullveldismálinum og breiða semjan hevði sett í »frígear«.

Var Høgni Hoydal harður móti samgonguni, so fekk hann minst líka nógv aftur. Tá samgongutingmenn ikki innanhýsis hava so nógv at vera ósamdir um, so duga í øllum førum at vera samdir um at vera ósamdir við Høgna Hoydal. Fyrstu tímarnir av viðgerðini var eitt langt orðastríð millum Høgna Hoydal og hansara nærmastu móti breiðu semjuni. Stríðið byrjaði longu, tá ið Høgni Hoydal fanst at, at Jóannes Eidesgaard ikki var møttur upp, tá viðgerðin byrjaði. Síðani gekk tað slag í slag við politisku orrustini.

### Í fleiri dagar

Fólk, sum ikki fingu fylgt við týsmorgunin, hava einki at vera bangin fyri. Viðgerðin av løgmansrøðuni heldur á í fleiri dagar afturat. Edmund Joensen, løgtingsformaður, hevur sett viðgerðina av løgmansrøðuna á skránna fram til fríggjadagin. Viðgerðin verður avbrotin hósdagin, tá ætlanin er at byrja viðgerðina av fiskidøgunum.

Fyrstu løtuna týsmorgunin var ikki líkt til, at viðgerðin fór at gerast serliga drúgv, men royndu politikararnir á tingi rokna kortini við, at tað verður drúgt, hóast áhugin fyri at gera viðmerkingar ikki tykjast at vera serliga stórur.



*Tað var langt frá fyrrverandi samgongustríðum í tinginum týsmorgunin. Um smílini vera eins »breið« eftir komandi ólavsøku, skal ikki verða sagt her*

*Mynd: Maria Olsen*